 

# Miðvikan



Müllerættin:

# Poul og svartkalvin

**Í undanfarna parti varð greitt frá persóninum Poul Müller, sum var kolonistjóri í Jakobshavn í Grønlandi til 1901. Hesa ferð verður greitt frá tí svartkalvaútflutningi, sum Poul byrjaði**

12. partur

Lars Dyrløv Madsen, okkara høvuðskelda til hesa søgu um Poul Müller, hevur serliga kannað svartkalvaútflutningin hjá honum, og fyrri partur í hesi grein er ein samandráttur av tí parti av ritgerðini hjá Lars, sum serliga snýr seg um svartkalvan.

Sum víst á í seinasta parti var Poul frammanfyri sína tíð á ymsum økjum, sum við telefon og djórahaldi.

Hann var eisini undangongumaður innan vinnuliga økið. Hann royndi at senda heim til Danmarkar eina heila røð av vørum og framleiðslum, sum vóru hansara egna hugskot.

Tann mest væleydnaða av hesum framleiðslum var saltaður svartkalvi, men Poul sendi eisini fleiri aðrar vørur til ymsar stovnar í Keypmannahavn. Her vann Poul sær bæði pening og eitt gott umdømi.

Eitt serligt samband var harra Skyum, sum var arbeiðsformaður hjá Poul, tá ið hann arbeiddi í Keypmannahavn. Tá so Poul fekk starv í Grønlandi var tað natúrligt, at Skyum bað sín gamla vin útvega sær grønlendskar vørur.

Tað var Skyum, sum stóð fyri skipasambandinum millum Danmark og Grønland, tí var hann tann rætti maðurin at hava samband við. Hetta samband kundi so útvega teimum báðum eina eyka inntøku.

Poul fekk eisini vørur afturfyri úr Danmark. Sum frá leið fekk hann nokk so dýrar vanar, sum tað sást aftur í hansara keypi av víni og rúsdrekka. Til sínar føðingardagar skonkti hann ikki færri enn 11 sløg av likør til kaffi. Hetta gav eisini eina uppá seg stóra rokning.

### Útflutti falkar og rýpur í dós

Tann 28. juni 1891 sendi Poul til Skyum eina nýggja framleiðslu. Hann vildi hava Skyum at kanna, um hetta var nakað, sum kundi seljast. Hetta var ein kassi av fjallarýpum í blikkum. Eisini sendi hann 25 livandi falkar at selja. Seks av teimum hevði Poul sjálvur fóðrað upp. Poul sendi eisini við ein hóp av dósarýpum sum fóður til falkarnar.

Hetta gekk ikki so væl, tí fleiri av falkunum doyðu á ferðini til Danmarkar..

Poul hevði brúk fyri peningi, so hann mátti royna nakað annað. Í 1892 sendi hann til Danmarkar einar 11 tunnur av svartkalva, sum hann biður Skyum selja fyri seg.

Nú byrjar svartkalvaævintýrið hjá Poul. Tað var ikki talan um nakra marknaðarkanning, so Poul visti ikki, um svartkalvin yvirhøvur kundi seljast. Hetta var vágið, tí útreiðslur hevði Poul undir øllum umstøðum av hesum.

Fyrsta árið eydnaðist sera væl. Prísurin sum fekst fyri tunnuna av svartkalva var 39 til 50 krónur. Hetta gav tilsamans kr. 1.546 eitt av fyrstu árunum. Av hesum skuldi Poul gjalda kr. 202 í farmagjaldi umframt útreiðslur av framleiðsluni. Tað var heilt fitt, sum leyp av.

Poul heldur fram at senda svartkalva til Danmarkar, har hann varð seldur til roykivirki. Men sum frá leið sendi hann til tveir móttakarar. Hin var Møldrup, sum Poul avloysti sum kolonistjóri. Nakað seinni sendir hann eisini svartkalva til fyrrverandi kolonistjóran Møller.

Samstundis sum Poul sendir svartkalva heim til Danmarkar, tilskilar hann persónar, sum skulu leskast við eini tunnu av svartkalva. Til skjals er eisini hópur av takkarbrøvum frá slíkum, sum Poul hevur veitt hendan beinan. Hann sendir eisini svartkalva til persónar ovast í toppinum hjá grønlendska handlinum. Hetta kann vera fyri at tryggja sær vælvild.



Henda myndin er tikin í Jakobshavn í juli 1901. Tað kann væl vera Poul Müller í hattinum

Men hann hugsar eisini um systir sína Sigrid í Jyllandi. Hon skuldi hava 50 krónur burturav. Tað, sum var eftir, skuldi gjaldast til vínhandlaran Fogt.

Onkrir trupulleikar hava verðið við Skyum, tí í 1894 sendir hann bert svartkalvan til nevnda Møldrup.

### Fer eisini í holt við svartkalvalýsi

Í 1897/98 var Poul í farloyvi í Danmark. Tá hann kemur aftur til Grønlands, sendir Poul svartkalvan til ein Houlberg.

Nú fer Poul eisini at handla við øðrum lutum. Hann fær brøv frá eini røð av stovnum í Danmark, sum biðja Poul útvega sær ymiskt. Tað snýr seg millum annað um Zoologisk Museum, Zoologisk Have og Valby skúla, sum var ein miðstøð fyri at útvega undirvísingartilfar til lívfrøði. Umframt er tað eisini stjórin fyri KGH, Ryberg, sum hevur síni ynski.

Øll ynskja lutir úr Grønlandi at sýna fram, sum beinagrindir av ymiskum djórum umframt fuglar og djór, sum eru útstappað.

Tað vóru 14 koloniir og kolonistjórar í Grønland, men tað tykist sum at hesar áheitanir komu bert til Poul. Hann má hava havt gott orð á sær sum maðurin, ið kundi greiða slíkar fyrispurningar.

Nú sendir Poul eina heilt nýggja vøru á marknaðin, nevniliga svartkalvalýsi. Hetta verður selt á uppboðssøluni hjá KGH.

Orsøkin til lýsiframleiðsluna kann hava verið, at Poul hevði fingið innhandlað meira av svartkalva enn hann hevði kvotu til. So heldur enn at blaka svartkalvan í havið aftur ella at geva hundunum hann, varð hann bræddur.

Tað kann eisini vera, at svartkalvin varð blivin ov gamal at kunna virkast. Ein orsøk kundu eisini vera tørvur á salti. Poul hevði kanska fingið meira svartkalva, enn hann hevði fingið salt frá handlinum.

Men í hvussu er gav lýsið pening av sær.

Tað er eingin ivi um, at Poul hevur verið ein slóðbrótari at finna nýggjar møguleikar. Men fleiri av hansara tiltøkum góvu einki av sær sum falkarnir og dósarýpurnar. Hetta seinna komst eisini av trupulleikum at gera dósirnar tættar.

### Var fyrstur við vinnuligum útflutningi av svartkalva

Tað er áhugavert at síggja, hvussu útflutningsmongdirnar og talið av útflytarum øktist gjøgnum 1890-ini.

Hetta er tó eitt sindur ringt at gera upp, tí nøgdin verður gjørd upp í tunnum, og tær eru ymiskar til støddar.

Tað er í 1892, at Poul fyrstu ferð sendir svartkalva heim til sølu fyri eyga. Eitt sløð hevði verið sent heim úr Grønlandi frammanundan, men tað var mest sum tinganest til kenningar í Danmark.

Í 1892 verða sendar 10 tunnur, innvigingarvektin er 1.303 kg. Tá Poul fer til Danmarkar í farloyvi kemur útflutningurin í Jakobshavn upp á 11.813 kg. Í 1899 er nøgdin 12.867 kg. Tá vóru útfluttar 213 tunnur av saltaðum svartkalva frá Jakobshavn.

Tað árið Poul er í farloyvi verður framvegis nógvur svartkalvi sendur til Danmarkar. So væl hevur hann dugað at læra frá sær.

Niðurstøðan er, at hóast Poul ikki var tann fyrsti at útflyta svartkalva, so var hann tann fyrsti, sum útflutti størri mongdir í fleiri fylgj-



Kjøbenhavn i Juni 1901.

Kære Ven!

*Brot úr brævi til Poul Müller*